VALGREINAR

Skúladepil á borðinum

Jógvan Arge
Valevni Tjóðveldisfloksins Í Suðurstreymi

Tekniski Skúli í Havn er nú eisini drigin upp í valstríðið. Sambandsrøddir vilja vera við, at onki er gjørt fyri hann.

Vit í Tjóðveldisflokkinum tóku ikki undir við einum uppskoti frá Sambandsflokkinum um, at landskassin fyrst skuldi veðhalda fyri einum stórum láni at byggja skúlan fyri, og síðani skuldi gjalda lánið aftur sjálvur við rentum.

Hetta var alt ov kreativt og fekk tankarnar at leita aftur til tær ringu veðhaldstíðirnar, sum nú kanska eru komandi aftur.

Men vit tóku undir við, at skúlin fekk tíðarhóskandi umstøður, og at landskassin skuldi gjalda íløguna kontant eftir nøkrum árum - gjarna saman við alternativari figging frá eitt nú kommunu og vinnulívi.

Á hesum grundarlag er farið undir at fyrireika skúladepil í Marknagili at vera karmur um útbúgvingarnar hjá Tekniska Skúla, Studentaskúlanum og partvíst Handilsskúlanum.

Mentamálaráðið hevur sett ein bólk at taka sær av málinum, og pengar eru settir av á fíggjarlógaruppskotinum til fyrstu fetini í ætlanini.

Mær kunnugt verður havt í huga at byggja soleiðis, at Tekniski Skúli fyrstur av øllum sleppur inn í tey høli, sum eru mest átroðkandi.

Rúm verður fyri fleiri íløgum á skúlaøkinum, nú tær størstu íløgurnar í samferðslu o.a. fara at hæsa av, og Skúladepilin í Marknagili stendur frammarlaga í raðnum.

Uppi í hesum málinum hongur sjálvsagt eisini skipanin av okkara miðnámsútbúgvingum sum heild. Tað er neyðugt at taka støðu til tann spurningin samstundis, sum tú fyrireikar teir fysisku karmarnar á tekniborðinum.

Tjóðveldisfloksins støða er, at øll skula hava miðnámsútbúgving, og á miðnámsskúlum skulu næmingarnir kunna velja sær tær høvuðsbreytir, sum teirra hugur stendur til - handverk, list, samskifti, vinnu, tøkni og náttúru.

Vilt tú skúlunum væl, so velur tú Tjóðveldisflokkin.

ÁÐRENN tú setir títt x, so hugsa um:

Jónfinn Petersen,
valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy

- Onkur má vera sum talar fyri familjuni!
- Onkur má vera sum vil verja tey veikastu!
- Onkur má vera sum torir og vil verja tað ófødda barnið!
- Onkur má vera sum rópar varskó, tá ið lógir verða gjørdar ímóti Guds orðið!
- Um hetta fer fyri bakka, hvat skulu vit so byggja okkara land á?

MIÐFLOKKURIN vil raðfesta rætt!

Nú er nóg mikið!

Heðin Mortensen
valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy

Teir veljarar, ið hava hildið seg valt politikarar at stýra landinum, munnu óivað hava kent seg ikki sørt nipnar hesi síðstu tvey valskeiðini.

Í staðin fyri fólk at stýra, hava vit fingið fólk at eksperimentera og spæla sær við einum dreymi um fullveldi. Hesin dreymur hevur stýrt øllum síðstu seks árini.

Nú kann er nóg mikið, tí nú tørvar landi okkara realpolitikarar, ið eru til reiðar at smoyggja upp um armar og fara til verka, so hugsað verður um at byggja land, tryggja vælferð og at fáa samfelagshjólini at mæla. Alt uttanumtosið um henda tóma fullveldisdreymin og teir kensluløddu flosklarnir mugu halda uppat, so vit aftur fáa fólk framat, ið seta samfelagið og vælferðina hjá tí einstaka fremst.

Óivað setti tann nú slitnaða samgongan sær sum mál at skriva eitt ella annað slag av søgu, men veruleikin er, at vit fara bara at minnast hana fyri klandur og stríð og tað, ið verri er.

Ger tí tína ávirkan galdandi, so politikarar sleppa framat, ið vilja landi og fólki tað besta. Vit hava sæð nóg mikið til egotripp og sjálvsøkni síðstu árini!

Vel Sambandsflokkin, tí tá ført tú trygd fyri, at landið er í góðum hondum!

Útoyggjamenning í Norðoyggjum Svínoy

Heini O. Heinesen,
løgtingsmaður og valevni Tjóðveldisfloksins í Norðoyggjum



Tað hevur verið nógv tosa um, hvussu vit kunnu menna útoyggjarnar í norðoyggjum, her hugsi eg serliga um Fugloynna og Svínoynna.

Svínoyggjin er frá náttúrunnar hond væl betri fyri enn Fugloyggin, av tí at hon liggur nærri meginlandinum. Heraftuat er ein smoltstøð í Svínoy. Hetta arbeiðspláss og tann mjólkaframleisla, sum er á oynni, hava tørv á betri flutningsmøguleikum.

Bygdaráðið í Svínoy hevur í fleiri ár sent skriv til løgtingi um at fáa tunnil yvir í "Havnina" sum er kyrrasta pláss í oynni. Her eru eisinni møguleikar fyri at gera eina fergulegu við eini minni havn. Vit kunnu eisini nevna sjógvaling útfrá hesu havn. Ein slík íløga kundi verði gjørd yvir fleir ár. Eg kann taka dømi av tí sum er gjørt til Gásadals, her hevur løgtingið játta 8 milió. um árið í 3 ár. Tunnilin er skotin í gjøgnum og loftið er tryggja fyri henda pening.

Vit kundu brúkt sama framgangsháttt, og gjørt ein tunnil í gjøgnum Svínoynna, yvir í "Havnina." So skuldi ein hóskani bilferga siglt inn í Sund. Hetta hevði loyst teirra trupulleikar við flutningi, av ferða fólki og farmi, til fulnar

Fugloy

Fugloyggin liggur verri fyri enn Svínoy, menn her eru ávísir møguleikar at menna oynna. Tað hevur verið nógv tosa um vindmyllur í seinastuni. Her skuldi verði ein góður møguleiki at sett eina vindmyllu upp. Orkan kundi verið brúkt til at skapt arbeiðspláss í Fugloy. Her er tað aftur alingin, hugsa verður um. Henda aling átti at fari fram uppi á landi, við at sprongt hyljarnar niður í lendi. Orkan frá mylluni kundi so verði brúkt til at pumpa sjógvin uppí hylljarnar. Hesu alibrúk hava tann fyrimun at tey kunnu sóttreinsast.

Um ein slík íløga verður gjørd, verður hon verandi so leingi sum hon verður hildin við líka. Her eru fleiri fyrimunir, tí viðlíkahaldi er so gott sum einki. Tað kann eisinni henda, at ein partur av alivinnuni fer at fara fram uppi á landi, fyri at sleppa undan sjúku. Heraturat slepst undan tí dýru útgerðini, sum aling á sjónum hevur við sær. Hetta er eisini ein møguleiki í Svínoyni. Har hevur ein ætlan verði frammi í pressuni nýðliga, um eitt orkuverk.

Tað dugur ikki nakað sum helst, at tosa um útoyggjamenning, um ein onga ætlan hevur við útoyggjunum.

Hetta er nakað sum eg fari at virka fyri um eg verði valdur 20. januar

http://heima.olivant.fo/~hoyh/
telef. 456810 mb. 216824

Lóggávan innan almannaverkið

Jancy Biskopstø Klein,
valevni Tjóðveldisflokksins í Norðoyggjum

Lóggávan innan almannaverkið er ófullfíggjað og ótíðarhóskandi. Fólk, sum av ymiskum orsøkum ikki kunnu syrgja fyri sær sjálvum, skulu fáa eina betri tænastu.

Vit hava eina forsorgarlóg, sum treingir til at verða dagførd. Í dag er eingin aktiveringsskipan fyri tey, sum av ymiskum orsøkum ikki eru á arbeiðsmarknaðinum, men sum verða hangandi í forsorgarskipanini uttan ein miðvísur innsatsur verður gjørdur fyri fáa tey slúsaði út beinanvegin.

Vit hava eina barnaforsorgarlóg, sum er eitt avrit av einar danskari lóg frá 1960 og sum hevur sín uppruna í eini lóg frá 1929. Hetta sigur eitt sindur um raðfestingina at hesum økið. Ein nýggj lóg innan hetta økið hevur verið á veg í nøkur ár, men vit mugu, sum samfelag, taka hond um okkara børn og ung og vísa teimum virðing, og gera eina lóg, sum tekur hond um og tryggjar okkara børnum og ungum tað hjálp og stuðul, tey hava fyri neyðini.

Vit hava heldur onga eldralóg, sum tryggjar teimum gomlu tað hjálp tey hava tørv á.

Veruleikin í dag er, at tær fyriskipanir og reglur, sum eru fyri tey eldru, eru spjatt útyvir ymiskar kunngerðir. Tørvur er á, at vit gera eina eldralóg, sum tryggjar teim eldru tað hjálp og stuðul tey hava fyri neyðini.

Tjóðveldisflokkurin gongur inn fyri, at hesi málsøkir verða løgd út til kommunurnar um umsita, og at uppgávu- og ábyrgdarbýtið ímillum land og kommunur, skal gerast greiðari. Kommunurnar kring landi mugu samstarva og skipa seg í økir, fyri at gera størri eindir og harvið tryggja eitt fakliga høgt tænastustøðið. Tjóðveldisflokkurin vil samstundis tryggja, at peningur fylgir við so hvørt málsøkir verða løgd út til kommunurnar.

VALGREINAR

Eitt gott Miðflokkaval

Jákup Andrias Jacobsen
valevni Miðfloksins í Eysturoy

Tað er ein sannroynd at Lerivík altíð hevur verið ein av fremstu bygdum í Føroyum, tá ræður um fiskivinnu, bæði á sjógvi og landi. Menn hava til allar tíðir róð út her frá, umframt at vit síðstu árini hava fingi hópin av størri fiskiførum til bygdina. Umframt tað eru fleiri fiskavirkir í bygdini.

Hetta eru týðandi arbeiðspláss, ikki bert fyri Leirvík, men fyri alla oynna og landið. Tað er sera týdningarmikið at Leirvík, framhaldandi fær tryggar, støðugar og mennandi karmar at ráða yvir, so bygdin og alt samfelagið kann fáa enn størri framgongd og avkast.

Tað eru viðurskifti ídag sum enn, heilt ella partvís ikki eru líðug umrødd og fingin uppá pláss, hvat viðvíkur bygdini Leirvík.

Tað fyrsta er, hvussu vega viðurskiftini skulu skipast, tá koyrandi verður við tunnlin til Klaksvíkar.

Her má og skal ein skilagóð loysn finnast.

Miðflokkurin hevur verið skotin í skógvarnar, at verða ímóti einum tunnli undir bygdini, men tað er ikki rætt. Miðflokkurin hevur sagt at miðvísar kanningar mugu gerast soleiðis at vit vita hvat skilabesta loysnin er.

Vísir tað seg at verða ein tunnil, (sum nógv týðir uppá), SO GERA VIT TAÐ - SJÁLVSAGT.

Tað næstu sum eg vil nevna er orkan, og brennistøðin í bygdini. Her er týdningarmikið at savna allar partur saman, so ein góð og haldbar loysn fæst, ísamband við dálking og hvussu brennistøðin verður útbygd.

Sjálvsagt vilja vit ganga á odda fyri at samfelagið verður reint og ódálka fyri okkara komandi ættarlið.

Til endans vil eg stutt nevna at Miðflokkurin tekur undir við at útróðrarbátar fáa frítt at fiska og at sjómansfrádrátturin verður varveittur. (helst skuldi hann eisini dekka arbeiðsfólk á fiskavirkum, men har mugu vit so upp við m.a. lægri avgjøldum og hægri botnfrádrátti í skattinum).

Til endans vil eg ynska øllum eitt gott Miðflokkaval og má Harrin framhaldandi signa og verja okkara land.

Tí stilli eg upp fyri Javnaðarflokkin

– tryggur politikkur á sjálvbjargnisleið

Helena Dam á Neystabø
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Sjálvstýristilgongd føroyinga má ikki klúgva tjóðina í helvt - men hon má heldur ikki steðga upp. So stutt kann tað sigast, og tí er neyðugt at finna eina semju, sum ikki avmarkar sjálvsavgerðarrætt føroyinga.

Flest øll eru samd um, at viljin til at klára seg sjálvan er ein drívmegi, ið fær bæði einstaklingar og samfeløg at bróta upp úr nýggjum og at skapa virðir burturúr tilfeingi, sum eingin fyrr hevði hugsað um. Hesum hava vit brúk fyri í dag.

Tað svitast heldur ikki, at eitt samstarv á jøvnum føti millum Føroyar og Danmark er nógv betri enn eitt samstarv, har Danmark hevur evsta vald í Føroyum á týðandi økjum.

Tíverri hevur tað ikki eydnast hesi seinastu 6 árini at finna ein leist, sum føroyingar kunnu semjast um.

Javnaðarflokkurin hevur eins og aðrir flokkar ásannað, "at heimastýrisskipanin avmarkar heimildir og virkisføri hjá føroyskum myndugleikum, og hon elvir til ógreiðu í valds- og ábyrgdar-býtinum millum føroyskar og danskar myndugleikar". Javnaðarflokkurin hevur tí orðað eitt uppskot til eina sjálvstýrislóg, sum kann vera grundarlag undir einari tjóðskaparligari semju um framtíðarstøðu Føroya.

Í stuttum er upskotið til sjálvstýrislóg Javnaðarfloksins:

At vit áseta viðurskiftini millum Føroyar og Danmark í einum sjálvstýrissáttmála sum ein politiskan sáttmála millum tvey sjálvstøðug lond, ið viðurkenna hvørt annað sum javnbjóðis tjóðir í einum felagskapi - ríkisfelagsskapi, samveldi ella frælsum felagsskapi. Hesin sáttmáli avmarkar ikki sjálvsavgerðarrætt føroyinga frameftir.

Verður sjálvstýrismálið lagt á hillina nú, kemur tað framhaldandi at klúgva tjóðina í tvey.

Uppskotið hjá Javnaðarflokkinum er eitt haldgott grundarlag undir teirri tjóðskaparligu semjuni, sum tey allarflestu leingjast eftir.

Lítil dugur í Fólkaflokkinum

Karl Olgar Joensen
valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum

Í seinasta Norðlýsinum kunnu vit m.a. lesa hesi orðini: "Eins og Kunoyggin verjir Klaksvíkina, hevur Fólkaflokkurin vart Norðoyggjar." Eg spurdi meg sjálvan: "Hvat hevur Fólkaflokkurin vart í Norðoyggjum? Hvat er tað sum Fólkaflokkurin er bangin fyri, tá ið hann tosar um at verja Norðoyggjar? Er hann bangin fyri, at onkur tekur Barsskor frá okkum, ella Másan kanska?

Tað er alt ov lágt mál at seta sær, bert at tosa um at verja tað sum er. Tey, sum vald verða inn á løgting at umboða Norðoyggjar, mugu verða framsøkin. Tey eiga ikki at verða nøgd við ferðamanna og farmaskipini Barsskor og Másan, ótíðarhóskandi tunnlar á Borðoynni og tunnlar og vegir í Kalsoynni, sum enn ikki eru asfalteraðir.

Vit kunnu bert ásanna, at hóast Fólkaflokkurin hevur havt tvey umboð á tingi fyri Norðoyggjar og hevur havt sjálvan løgmann eisini, so eru avrikini ikki tey stóru seinastu árini. Tað er stórt spell, at so lítið er komið til Norðoyggjar, tá ið hugsað verður um gulláríni, vit hava havt.

Í valskrá Sambandsflokssins stendur m.a.: "Bert við eini vælvirkandi samferðslu millum allar partar av landinum, eru fólk og vinnulív uttanfyri miðstaðarøkið tryggjað javnbjóðis vinnuligar og mentanarligar karmar. Tí vil Sambandsflokkurin halda fram við at útbyggja samferðslukervið, so flutningur av fólki og farmi verður tryggari og lættari."

Allir norðoyingar eru samdir um, at samferðslukervið í Norðoyggjum er alt ov vánaligt. Nú tað sær út til, at Sambandsflokkurin fer at standa fyri landsins leiðslu komandi árini, er tað sera umráðandi, at ein sambandstinglimur verður valdur í Norðoyggjum, sum hevur møguleika at gera nakað munagott við at bøta um vánaligu samferðsluviðurskiftini.

Eg fari at heita á allar norðoyingar, um at gera tað púra greitt á valdegnum, at nú vilja vit hava eitt nýtt stýri her á landi, sum veruliga kann fara í gongd við at føra politikk til gagns fyri okkum øll.

Vel Sambandsflokkin!

Um at fara lætt um veruleikan

Jenis av Rana
valevni Miðfloksins í Suðurstreymi



Áðrenn tú úttalar teg, mást tú kunna teg um tað, tú førir fram, og tryggja tær at tað er grundað á sannleikan. Hvørga av hesum fyritreytum lúka teir báðir- Oddfríður og Klæmint, nú teir í bløðunum leggjast á Miðflokkin.

Miðflokkurin og mentan.

Mentan er í hugaheimi Miðfloksins annað og meir enn enn tann lítla mentannarichan, sum nøkur hava avbyrgt seg í og meta vera einastu mentan, ið verd er at stuðla.

Mentan er í hugaheimi Miðfloksins tann ørgrannin av virksemi, sum dagliga fer fram í hvørjari bygd, og sum flestu føroyingar luttaka í.

Mentan er ein meldur av tiltøkum, sum virka hond í hond, og geru við til at gera Føroyar til nærum eitt paradís á jørð.

Miðflokkurin fer til allar tíðir at verja føroyska mentan, men fer eisini til eina og hvørja tíð at tilskila sæt rætt at siga frá, tá og um vit meta, at skilaloysi hevur tikið ræðið. Tað skylda vit teimum, ið gjalda í landskassan, teimum, ið velja okkum at umsita hendan partin av peningi teirra.

Valskrá Miðfloksins.

Sum einasti flokkur valdi Miðflokkurin at leggja alt fram í valstríðnum, ikki bert lyftir, men eisini hvussu hesi skulu gjaldast. Tað halda vit vera minsta krav!! At lova, men ikki siga hvusu gjaldast skal, er ein úsælig roynd at lumpa veljaran eftir atkvøðuni.

Vit boðaðu frá, at vit raðfesta barnafamiljurnar fremst vegna vána umstøður teirra, somuleiðis viðurskifti teirra gomlu, sjúku og tarnaðu, og at peningin til hetta vildu vit finna á nærri tilskilaðum økjum. Har nevndu vit minkan av ferðakostnaði tess almenna, og av vit føru at hyggja nærri at og raðfesta ørðvísi á m.a. nøkrum fáum mentanarøkjum. Har stóð einki um at taka burtur stuðul- men at vit, við at raðfesta øðrvísi, fóru at finna pening á hesum kontum til barnafamiljurnar, tey eldru, sjúku og tarnaðu.

Miðflokkurin og atkvøðan

Soleiðis er Miðflokkurinog tey, sum eru samd í hesum sjónarmiðum kunnu so velja Miðflokkin. Onnur, sum meta at t.d. heiðursgávur til útvald mentannarfólk skulu raðfestast framum hesar týðandi samfelagstørvir, velja so aðrar - tíverri.

p.s. Er tað ikki løgið at vit ongantíð hoyra um heiðurs- og sømdargávur til flakakvinnur, heimahjálpir, arbeiðs- ella fiskimenn, men bert til ávís mentannarfólk?